# Ein urtagarðsmaður fyri



Standmyndin av Victor Danielsen er ein sonn lýsing av hesum andaliga stríðsmanni okkara. Tey, sum kendu hann siga, at bæði andlitsbragd og kropsburður er júst soleiðis sum hjá honum

**Seinnapartin í gjár avdúkaði Sigurð Simonsen, borgarstjóri í Fuglafirði standmyndina av bíbliutýðaranum og prædikumanninum Victor Danielsen. – Saman við Jákupi Dahl, prósti gjørdi hann sítt til at menna og varðveita okkara mál, segði borgarstjórin í røðu síni**

STANDMYND

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

**Fuglafjørður:** - Hetta er ein sonn lýsing av hesum andaliga stríðsmanninum Victor Danielsen!

Tað var ein afturvendandi setningur, sum varð sagdur í sambandi við hátíðarligu løtuna, tá standmyndin hjá listamaninum Hans Paula Olsen varð avdúkað í gjár.

Tað var býráðið í Fuglafirði sum í síni tíð setti niður eina serstaka nevnd at taka sær av hesum málinum. Arbeiðið var nú umsíðir komið so langt, at standmyndin var liðug og kundi avdúkast í býnum, har hann búði meginpartin av lívi sínum.

Talan er um eina vakra og upprætta standmynd av hesum manni, sum legði bæði lív og sál sína í fyri

*»Henda hondin hjá Victori kundi eins væl verið ein mynd av Guds hond – ella ein mynd av, hvussu Victor lat seg brúka í andaligari tænastu fyri frelsara sín, ið hann hevði sett álit sítt á«*

gleðiboðskapin í skrift og talu á føroyskum. Tað var tí ikki uttan orsøk, at onkur sammetti Victor Danielsen við andaliga stríðsmannin úr 1. øld, Paulus ápostul.

Undir liðini á standmyndini er sett ein ovurstór hond við einum fyllipenni í, og frammanfyri hesa vóru skrivað tey fyrstu ørindini úr 1. Mósebók, tá Victor í síni tíð byrjaði at týða alla Bíbliuna.

- Henda hondin hjá Victori kundi eins væl verið ein mynd av Guds hond – ella ein mynd av, hvussu Victor lat seg brúka í andaligari tænastu fyri frelsara sín, ið hann hevði sett álit sítt á, var onkur sum tók til frammanfyri standmyndini.

Á hátíðarhaldinum slapp Helena Dam á Neystabø at halda sína fyrstu røðu sum landsstýriskvinna í mentamálum. Umframt hana